

# Warren Buffett er heimsins ríkasti

Amerikanski ríkmaðurin, Warren Buffett, hevur troðkað Bill Gates burtur frá trónuni sum heimsins ríkasti maður. Warren Buffett er 77 ára gamal eigari og stjóri í ognarfelagnum Berkshire Hathaway, ið farna árið hevur sæð sína ognir vaksa úr 52 til 62 milliadir dollarar. Hetta hevur sent Bill Gates niður á eitt 3. pláss eftir í 13 ár hevur verið skrásettur sum heimsins ríkasti maður. Næstu á plássinum yvir heimsins mest múgvandi menn kemur Carlos Slim Helu úr Mexico (Telesamskifti) við eini ogn upp á 60 milliardir dollarar, ið er ein framgongd uppá 11 milliardir seinasta árið.
www.business-line.fo



*FAS skal flyta seg, so hon gerst ein verulig altjóða skipan fyri handilsskip kring allan heim, segði Bjørt Samuelsen, landsstýriskvinna á Shipping Føroyar 2008*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

froðingar, grannskoðarar, eftirlit, trygging og annað virksemi.

- Ein stórur handilsfloti fer eisini at veksa um okkara útlát av $CO_2$, men hesi skip lata út somu mongd av $CO_2$ uttan mun til, hvar tey eru skrásett. Kyoto er ikki galdandi fyri handilsskip og økir tí ikki um okkara útlát.

Hon vísti á, at framtíðar reglur um minking av útláti verða í framtíðini ásettar í altjóða samhaldsføstum konventiónum við tillagingartíð, og skulu vit sjálvandi vera virkin í hesum arbeiði.

## Á hægsta stigi

- Vit vilja, at Føroyar skulu bjóða fram eina tænastu, sum er fíggjarliga og tøkniliga kappingarfør við fremstu kappingarneytarnar, og tá ið ræður um trygd fyri manning og umhvørvi annars er á allar hægsta støði.

Landsstýriskvinnan segði, at hon miðvíst fer at arbeiða fyri einum góðum samanspæli við vinnuna til tess at menna verandi skipan til ein virknan, sjónligan og kappingarføran leikara í altjóða sjóvinnu.

- Føroya Altjóða Skipaskráseting skal flyta seg, so hon gerst ein verulig altjóða skipan fyri handilsskip kring allan heim, segði Bjørt Samuelsen.



*- Vit føroyingar gjørdu sum vit plaga, tá ið vit fingu FAS-skipanina, nevniliga eina fyribilsloysn. Tað er ein so deiliga typisk føroysk handfaring av øllum málum, segði Tórbjørn Jacobsen, landsstýrismaður*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

# Gjónna í einum lopi

**- Kendi enski statsmaðurin Lloyd George segði einaferð, at tað er lítið skilagott at leypa yvir um eina gjógv í tveimum lopum, tá tað kann gerast í einum. Boðskapurin er ikki til at misskilja, segði Tórbjørn Jacobsen, landsstýrismaður á Shipping Føroyar 2008**

SHIPPING 08
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

- Fyri mongum árum síðani dagaði ein nýggj kapping undan í handilsskipavinnuni. Lond at kalla misbrúktu sítt nationala symbol – flaggið - afturfyri at fáa vinning burturúr pørtum av heimsflotanum. Tað var skjótt, at tosað var um hentleikafløgg, ringan stand, lág førleikakrøv - ja, um eina "discount" loysn og verri enn tað. Til endans mundi dastið av hesum flota vera plimsollarar, sum bara havsins cowboyarar og ditto klondeikarar á landi tímdu at fáast við. Panama og Liberia gjørdust ímyndin av havsins flótandi kistum.

Soleiðis málbar Tórbjørn Jacobsen, landsstýrismaður, seg, tá ið hann trein á pallin í Norðurlandahúsinum á Shipping Føroyar 2008.

Hann vísti á, at avleiðingin av hesi sníkjandi kapping gjørdist til endans, at teir seriøsu aktørarnir í vinnuni, og londini teir virkaðu úr, máttu taka eitthvørt stig, soleiðis at ein heil og berandi vinna ikki skuldi flýggja út av landinum. Hetta er gjørt í eitt nú Isle of Man, Noregi og Danmark.

Í prinsippinum er tað skilaleyst at reka vinnupolitikk við at diffirentiera í landsins skattapolitikki. Tað hugsi eg, at tey flestu eru samd við mær í. Somu sannføring hava teir helst havt í nevndu londum, tá teir kendu seg noyddar at boygna fyri at varðveita flota, vinnu, fíggjarsektor, tryggingarvinnu, shippingvinnu og handilin, sum var avleiðingin av skiparakstrinum.

Tórbjørn vísti á, at hesir valdu eina nettohýruloysn og hava síðani staðið seg væl og virðiliga í kappingini á heimshøvunum. Hýrurnar hjá teimum mynstraðu eru betri enn nakrantíð, útgerðarfeløgini hava tað gott og genereraði kapitalurin í samfelagnum er vaksandi. Ørvarnir á parametrunum ota seg upp ímóti skýggjunum, sum hann tók til.

- Vit føroyingar gjørdu sum vit plaga og fingu eina fyribilsloysn. Tað er ein so deiliga typisk føroysk handfaring av øllum málum. Pseudo, vit elska alt sum er pseudo, trívast best sum ein "bagatel" ella sum ein "parantes", eisini politiskt og vinnuliga. Trívast eftir øllum at døma best í lívd og le.

Landsstýrismaðurin vísti á, at politiska skipan okkara, sum í einum og øllum plagar at hava Danmørk sær til fyrimyndar, valdi aðra kós í farmaskipamálinum. Orsøkirnar kunnu vera so mangar.

- Ræðslan fyri hesi alternativu skattaskipan, óttin fyri at fiskiskipaflotin, sum flytir okkum allan útflutningin upp á land, fór at leggja trýst á fyri at fáa somu ágóðar og so víðari. Úrslitið gjørdist, at vit valdu ta svensku skipanina, sum longu tá var ávegis at gera enda á stóra svenska flotanum. Ein afturberingar skipan, sum hvørki var heil ella hálv. Manningarnar fingu einki burturúr, reiðaríini fingið nakað, men komu tó ikki í eina nóg góða kappingarstøðu mótvegis teimum bestu skipanunum, sum vit kenna. Føroyar fingu at kalla onki burturúr hesum - í hvussu er ikki í mun til, hvat kundi fingist burturúr, um vit valdu at knæsett ta skipan, sum stóð best í altjóða kappingini.

Landsstýrismaðurin vísti til orðini hjá kenda enska statsmanninum Lloyd George, sum einaferð helt fyri, at tað er lítið skilagott at leypa yvir um eina gjógv í tveimum lopum, tá tað kann gerast í einum.

- Boðskapurin er ikki til at misskilja, segði Tórbjørn Jacobsen, landsstýrismaður á Shipping Føroyar 2008, tá ið hann mælti til at gera allar neyðugu broytingarnar í FAS-skipanini í einum.